# McCain er **marran** h

**Alt bendir á, at Vietnam-veteranurin John McCain verður republikanska valevnið til forsetavalið í november. Hóast McCain als ikki er væl lýddur millum tey høgravendu í republikanska flokkinum, er hann tað valevnið, ið hevur best møguleika at koppa Barack ella Hillary. Eftir at hava verið úti í kuldanum so at siga allan valdystin, stendur McCain brádliga sum tann fremsti republikanski avbjóðarin**



## Forsetavalið




**Steffn í Skorini**
steffan@sosialurin.fo


Fyri trimum mánaðum síðani var pengakassin hjá John McCain tómur, og dreymurin um at gerast amerikanskur forseti var so at siga brostin.

Men McCain legði ikki árarnar inn. Hann tók eitt lán uppá fimtan milliónir krónur og helt fram við valstríðnum, sum tey flestu hildu var deyðadømt frammanundan. Eingin gav nevniliga tí sjeytiára gamla fyrrverandi hernaðarpilotinum nakran møguleika at gerast forsetavalevni hjá republikanarunum.

Tá atkvøðurnar vóru taldar upp eftir "supertuesday" var greitt, at John McCain helst fer at gerast valevnið hjá republikanska flokkinum í november. Argasti kappingarneytin, Mitt Romney, valdi eisini at taka seg aftur, eftir at hann hevði tapt so dyggiliga.

### Fíggindar í egnari legu

McCain er ein umstríddur maður á tí konservativa vonginum í amerikanskum politikki, og hann møtir harðari mótstøðu í sínum egna flokki. McCain verður av høgravonginum í flokkinum mettur at vera ov liberalur, og hann verður lagdur undir at vera ein maður uttan prinsippir og virðir.

McCain hevur t.d. eina liberala støðu í spurninginum um innflytarar, sum er eitt mál, ið hevur verið ovast á breddanum serliga í tí konservativu pressuni. McCain hevur verið ein forsprákari fyri eini pragmatiskari loysn á spurninginum um tað stóra talið av ólógligum innflytarum í USA, og tað fellur ikki í góða jørð hjá fleiri í tí republikanska flokkinum.

McCain hevur harumframt verið sera harðligur í sínum kritikki av handfaringini av krígnum í Irak, og hann hevur ikki kínt sitandi forseta við hárunum. Eisini í spurninginum um avhoyringarhættir av fangum á Guantanamo-leguni hevur McCain funnist at politikkinum hjá stjórnini. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at hann sjálvur var tortureraður í fangalegu í Vietnam, har hann sat í fimm ár.

### Flokkur í tvíningum

Fleiri framstandandi limir í republikanska flokkinum, ið hoyra til tann sosial-konservativa vongin, sum er tann mest valdsmikli bólkurin í flokkinum, hava roynt at skipa eina mótstøðurørslu ímóti McCain, og tann religiøsi leiðarin James Dobson kunngjørdi, at hann undir ongum umstøðum kundi stuðla McCain.

- Um McCain verður nomineraður, fer tað at leggja tann republikanska flokkin í oyði.

So bersøgin er tann ultrakonservativi og útvarpsverturin, Rush Limbaugh, sum hevur nógv viðhaldsfólk, ið atkvøða republikanskt.

Vælumtókti sjónvarpsverturin Mike Hannity á Fox News hevur eisini endurtikið sína mótstøðu ímóti McCain ferð eftir ferð. McCain er heilt einfalt ikki nóg konservativur, og hann umboðar ikki tey konservativu virðini sambært Hannity.

Fleiri konservativir viðmerkjarar hava enntá sagt, at teir heldur velja Hillary Clinton enn at seta krossin við McCain.

Ein orsøk til at McCain nú er komin so langt í valstríðnum er, at konservativu fíggindar hansara í republikanska flokkinum ongantíð hava tikið hann í álvara.

Veljarakanningar, sum vórðu kunngjørdar fyri nøkrum mánaðum síðani, vístu, at Romney fór at vinna teir fyrstu avgerandi statirnar, og Rudy Giuliani fekk best undirtøku kring landið, og tí var McCain als ikki tikin við í líkningina.

Nógv bendir á, at tað er Mike Huckabee, sum hevur spilt Romney spælið. Huckabee er prædikumaður í eini baptistasamkomu í suðurstatunum, og hann fekk tí dyggan stuðul frá teimum sosialkonservativu, sum kanska annars høvdu valt Romney.

Huckabee vann so at siga allar suðurstatirnar í tí sokallaða bíbliubeltinum og stjól harvið virðismiklar atkvøður frá Romney í hesum økinum.

### Fríggjar til tey konservativu

John McCain hevur verið kendur fyri at samstarva nógv tvørturum miðjuna í amerikanskum politikki, og tí fer hann væntandi at arbeiða saman demokratum